# Jólatiltøk

Á Kunningarstovuni í Havn verður lýst við øllum tiltøkunum, sum eru í býnum, og so selja tey eisini atgongumerkir til konsertir, ið verða í nærmastu tíð – harímillum eru Bryan Adams og Nýggjárskonsertina. Millum mongu tiltøkini í sambandi við dagarnar uppundir jóla er ein framsýning, sum ber heitið »Minnist tú?«. Framsýningin er í Degns hús. Her kann tann vitjandi uppliva, hvussu eitt vanligt føroyskt heim sá út í tíðini millum 1920-1945. Eisini kann mann síggja, hvussu tey pyntaðu og hugnaðu um jólini tá, og somuleiðis hvørji bløð og tíðarrit vórðu lisin í jólamánaðinum. Framsýningin er opin inntil kl. 18.00 hvønn dag. Hóskvøldið er tó upplestur í húsinum kl. 20.00 av yrkingum og ymiskum bókmentum. Fleiri onnur tiltøk eru í døgunum uppundir jólaaftan. T.d. ganga jólamenn í miðbýnum við karamellum og øðrum góðum og heilsa uppá tey vitjandi. Inni á heimasíðuni HYPERLINK "http://www.kunning.fo" www.kunning.fo sær mann meiri um upplatingartíðir og tey mongu tiltøkini um jólini.






















